


# Skip við føroyskari manning við til oljuvenjing

**Jan Müller**

16.06.2014 - 15:44

Oljan.fo

Hóast Føroyar ikki eru við í venjingini at basa oljudálking, sum vit umrøddu í gjár, so eru fleiri føroyingar og føroyska flaggið við í venjingini, sum er á gomlu Frigg-leiðini.

Eitt av skipunum, sum eru við til venjingina, er Stril Mariner. Tað er norska reiðaríið Simon Møkster Shipping, sum eigur skipið, men tað siglir undir føroyskum flaggi, og harafturat er manningin føroysk. Eiðismaðurin Ingi Ellingsgaard er skipari.

Stril Mariner hevur langtíðarsáttmála við BP sum tilbúgvingar- og veitingarskip á Ula/Tambar/Gyda-leiðini. Skipið er serútgjørt til at basa olju og at taka hana upp. Harafturat er skipið eisini útgjørt til at bjarga fólki, og í neyðstøðu kann tað hýsa umleið 300 fólkum. So stórar uppgávur krevja servanda manning.

Stril Mariner er eitt av fýra skipum hjá Simon Møkster Shipping, sum eru undir føroyskum flaggi og hava føroyska manning. Tor-shipping í Havn stendur fyri at manna skipini, og føroyingarnir umborð eru gott og væl 100 í tali.